# Nýtt apotek í Runavík




*Sølustaðið, sum Tjaldurs Apotek hevur í Runvaík, verður skjótt avloyst av einum nýggjum apoteki*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Nýtt apotek verður í næstum bygt í Runavík. Bygt verðurí framhaldi av heilsumiðstøðini**

HEILSUVERK
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Um stutta tíð verður farið undir at byggja fjórða apotekið í Føroyum. Tað verður bygt í Runavík og fer at kosta eina átta milliónir krónur.

Nýggja apotekið, sum talan er um at byggja, verður bygt upp í heilsumiðstøðina í Runavík. Sostat verður talan um at fáa skipað alt heilsuumhvørvið á staðnum sum eina heild, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari.

Hann sigur, at fyrireikingarnar eru komnar heilt væl áleiðis. Tekningar eru lidnar, og aðrar fyrireikingar eisini. Kostnaðarmeting er um at vera liðug, og mett verður, at apotekið fer at kosta einar átta milliónir krónur, sigur hann. Tað verður helst lkárt at byggja um nakrar heilt fáar mánaðar.

Apotekið í Runavík verður ikki latið upp sum eitt liðugt apotek soleiðis beinanveg. Tað vil siga, at heiligvágsframleiðsla verður helst ikki beinanveg, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari. Men bygningurin verður gjørdur soleiðis, at hann er klárur til tess, tá tann tið kemur.

Og við teirri gongd, sum er í løtuni, væntar landsapotekarin ikki, at tað verður ræittiliga leingi, til tíðin er búgvin at hava eitt rættiligt apotek í Runavík eisini.

Tjaldurs Apotekið hevur havt eina søludeild í Runavík, og tørvur er avgjørt á henni, hava royndirnar víst. Gongdin her hevur verið tann, at heiligvágurin er umbiðin av læknanum og framleiddur í Havn. Síðan er hann sendur til Runavíkar seinnapartin og heintaður har. Umframt koma so allar tær vanligu hondkeypsvørurnar, fólk brúka.

Landsapotekaarin sigur, at gongdin hevur verið, at eisini alt fleiri fólk úr norðara parti av Eysturoy hava brúkt søluna í Runavík, tí tað er skjótari at fara tann vegin, enn at fara til Havnar.

Apoteksverkið í Føroyum er alment og kann sum so ikki samanberast við eitt nú tað danska. Í Danmark eru privat apotek, sum lata heiligvág til privatfólk, meðan amtini eiga tey sonevndu sjúkrahúsapotekini, sum lata til sjúkrahúsini. Í Føroyum verður alt latið frá sama stovni. Tað ger so eisini, at føroyska apoteksverkið hevur skyldu at senda heiligvágin ókeypis hagar, hann ikki kann heintast av einum apoteki ella sølustaði. Eitt nú útoyggjarnar.

Við at hava eitt sølustað í Runavík, har fólk sjálv koma at heinta heiligvágin, hevur apotekið spart væl at portoútreiðslum, eins og fólk eisini hava fingið sín heiligvág skjótari, enn um hann varð sendur við posti.

Til dømis kann ein sjúklingur í Oyndarfirði biða um penicillin frá læknanum mánamorgun. Læknin biður um heiligvágin frá apotekinum, sum sendir hann til Runavíkar seinnapartin, har hann kann heintast við tað sama.

Skuldi apotekið hinvegin sent heiligvágin við postinum, var hann ikki í Oyndarfirði fyrr enn týsdagin.

Tað eru í løtuni trý apotek í Føroyum. Tjaldurs Apotek umframt Norðoyar- og Suðuroyar Apotek. Tey bæði apotekini í Klaksvík og á Tvøroyri er umleið líka stór, meðan Tjaldurs Apotek aftur er fimm ferðir so stórt sum tey bæði, sigur landsapotekarin.

KOSTRÁÐSTEVNA
- á Hotel Føroyum
Norski kostráðgevin Kenn Hallstensen kemur á vitjan í Føroyum.
Ráðstevnan byrjar
leygardagin 28.04.01 kl. 15.00.
Øll eru vælkomin.
Tosa verður millum annað um, hvussu likamið ávirkast av ymiskari føði.
Eisini verður greitt ítøkiligt frá, hvussu vit kunnu fáa eina betri heilsu, við at nýta kostískoyti.
Atgongumerki á kr. 100
fáast í forsølu á kunningarstovunum kring landið.
- Við dyrnar er kostnaðurin kr. 150.



# Fiskiloyvi hava stóran týdning fyri útjaðaran

**– Tað er neyðugt at kanna fiskivinnuna út í æsir útfrá einum samfelagsligum sjónarmiði, heldur Bogi Mortensen, formaður í Økismenningarnevndini**

FISKIRÆTTINDI OG ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

– Kemur fiskivinnupolitikkurin fyrst inn á skeiva kós, verður tað ómøguligt at venda við. Tí er tað neyðugt at kanna støðuna væl og virðiliga, áðrenn kósin verður stungin út í kortið.

Tað heldur Bogi Mortensen, ið var formaður í økismenningarnevndini, sum herfyri handaði landsstýrinum eitt drúgt álit um støðuna og framtíðarútlitini hjá teimum ymsu økjunum í landinum.

Og nú Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, hevur gjørt eina frágreiðing um, hvussu hann heldur, at fiskivinnupolitikkurin skal vera, hevur hann lagt stóran dent á, at reiðarar skulu hava so fríar ræsur sum gjørligt at keypa og selja fiskiloyvi.

Eftir hansara áskoðan, fer tað at føra við sær, at flotin fer at laga seg til tað tilfeingi sum er, og tað fer sostatt eisini at bøta munandi um rakstrarúrslitið hjá flotanum, tí tað fara at vera færri skip og tískil meiri fiskur til hvørt skipið.

Hesum er Bogi Mortensen ikki treytaleyst samdur í.

– Tað er onki at ivast í, at fiskiloyvi hava havt, og framvegis hava stóran týdning fyri útjaðaran í Føroyum.

Hann heldur, at tað er ringt at hugsa sær, hvar Suðuroyggin hevði verið í dag, um hon ikki hevði havt tað fiskivinnu, hon hevur havt.

– Hetta hevur ikki bara týdning fyri sjálva fiskivinnuna. Men tað elvir somuleiðis eisini til nógv annað virksemið, at skip koma til eitt pláss at avreiða. Tað fylgir nógv annað virksemi ið kjalarvørrinum á skipunum, tí tað gevur bæði smiðjum, trolvirkjum, radiomekanikarum, arbeiðsfólki á landi o.s.fr., o.s.fr., arbeiði.

– Tað avleidda virksemið er nógv og tað er ongin ivi um, at fiskiskipini eru eitt veldugt íkast til tey ymsu lokalsamfeløgini í Føroyum.

Bogi Mortensen sigur, at tað vísir seg, at skipini aloftast koma inn har tey hoyra heima, at avreiða, um tað yvirhøvur ber til.

– Skip úr Suðuroy avreiða í Suðuroynni, eitt nú til uppboðssøluna í Vági, og so kunnu virki aðrastaðni keypa fiskin haðani.

Hann vísir eisini á, at skipini leggja stóran dent á at avreiða har, manningin er frá, tí tað gevur teimum eina løtu eyka heima.

– Eitt nú er samferðslan til og úr Suðuroynni so vánalig, at skulu skip úr Suðuroy avreiða aðrastaðni, er stórur møguleiki fyri, at manningin ikki sleppur heim, fyrrenn seint um kvøldið og noyðist avstað aftur tíðliga morgunin eftir.

**Vandi fyri miðsavning**

Bogi Mortensen ivast ikki í, at fáa reiðarar fríar ræsur at keypa og selja fiskiloyvi, fer tað at økja um vandan fyri at fiskiloyvini verða miðsavnað.

–Vit mugu síggja í eyguni, at kapitalurin er miðsavnaður. Tí er eisini vandi fyri, at fiskirættindini verða miðsavnað.

Tí heldur hann, at tað hevur stóran týdning, at vit gera okkum púra greitt, um hetta er tað rætta.

Og hann heldur, at fyri at finna útav tí, mugu nógv fleiri kanningar gerast um støðuna, enn tað eru gjørdar higartil

– Tað er ikki nóg mikið at taka fiskiflotan burturúr heildini og viðgera hann fyri seg sjálvan. Tað er ikki sagt, at tað, sum er tað besta fyri teir einstøku reiðararnar, eisini er tað besta fyri samfelagið, sum heild.

–Tí er tað sera neyðugt, at vit viðgera fiskivinnuna útfrá einum samfelagsligum sjónarmiði og ikki bara útfrá einum ísoleraðum, vinnuligum sjónarmiði.

Tað skerst ikki burtur, at bæði fiskivinnufrøðingar og búskaparfrøðingar hava mælt til, at reiðarar fáa fríar ræsur at keypa og selja kvotur.

– Men eg haldi eisini, at teir hava viðgjørt málið útfrá einum isoleraðum, vinnuligum sjónarhorni. Men eg haldi, at tað skal meiri til fyri at taka tað røttu avgerðina. Tað er neyðugt at seta fiskivinnuna í ein samfelagsligan samanhang og tá kann tað væl henda, at myndin sær øðrvísi út.

Hann vil ikki við hesum siga, at hann heldur, at fiskiloyvi skulu býtast út á økir.

– Men eg haldi avgjørt, at tað er neyðugt at viðgera fiskivinnuna, sum er okkara høvuðsvinna, útfrá einum samfelagsligum sjónarmiði. Og í tí sambandi skulu eisini vinnulig og økismenningarlig atlit takast.

Og tað heldur hann, hevur avgerandi týdning at gera, áðrenn avgerandi stig verða tikin - ikki minst tá ið tað eisini er staðfest, at fiskiríkidømið er ogn Føroya fólks.

– Leggja vit fyrst á skeiva kós, er tað vónleyst at rætta skútuna aftur. Standa vit um 10 ár og eru komin til ta niðurstøðu, at tað var skeivt at geva leyst at keypa og selja fiskirættindi, kanska tí at øll fiskiloyvini eru miðsavna, verður tað vónleyst at venda gongdini aftur og at lóggeva fiskiloyvi út aftur á tey ymsu økini í landinum. Vit vita av royndum, at tað ber ikki til, sigur Bogi Mortensen.

– Tí heldur hann at tað er avgerandi neyðugt, at málið verður lýst út í æsir, áðrenn nøkur stig verða tikin.

– Tað er neyðugt at bygnaðurin í fiskiflotanum, sum hann er nú, verður lýstur út í æsir. Samstundis mugu nágreiniligar kanningar setast í verk av, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa fyri samfelagið, um vit fara hendavegin, ella hinvegin við fiskivinnupolitikkinum.

Hann vísir m.a. til kjakið, sum nú hevur tikið seg upp um almenna umsiting.

– Taka vit almenna umsiting burturúr heildini, og meta hana fyri seg, er tað kanska effektivast, at hon øll liggur í Havn. Men samstundis er niðurstøðan, at samfelagsliga er tað betri, at hon er spjødd út um landið. Tí eru nakrar uppgávur tiknar frá miðfyrisitingini og lagdar út til kommunurnar, og framyvir fara helst fleiri málsøki sama veg.

*– Tað er ikki nóg mikið at taka fiskiflotan burturúr heildini og viðgera hann fyri seg sjálvan, tí tað er ikki vist, at tað, sum er tað besta fyri teir einstøku reiðararnar, eisini er tað besta fyri samfelagið, sum heild, sigur Bogi Mortensen, sum var formaður í Økismenningarnevndini*



### Vil hava betri grundgevingar

Formaðurin í Økismenningarnevndini trýr heldur ikki rættiliga uppá, at tað fer at føra til eitt so nógv betri rakstrarúrslit, um reiðarar sleppa at keypa og selja kvotur, sum teir vilja.

– Ein kanning hjá Farec hevur júst staðfest, at føroyski fiskiflotin er væl rikin afturímóti tí norska og tí íslendska fiskiflotanum.

Bogi Mortensen vísir eisini á, at tað er ongin loyna, at undirleverandørar av ymsum slag, eitt nú skipasmiðjur, og aðrir við, hava sett pening í nógv skip.

– Tað skerst ikki burtur, at tað bindur skipini í ein ávísan mun. Og tað, at skipini eru bundin at ávísum undirleverandørum, er ikki nakað, sum fremur tann besta raksturin.

Hann heldur tí, at skal tað gevast leyst at keypa og selja fiskiloyvi, skulu betri grundgevingar til, enn tað, at tað fer at føra við sær, at tá fer flotin at verða so nógv betri rikin, enn hann er nú.

### Ikki ráfiskabýtið umaftur

Fyri út ímóti 20 árum síðani skuldi eitt ráfiskabýti setast í verk í Føroyum, so at hvørt øki í landinum skuldi hava rætt til eitt ávist tonsatal av fiski.

Men tað gekk ikki leingi.

Bogi Mortensen heldur, at verður niðurstøðan, at tað er rætt at leggja fiskiloyvi út á økini, kann tað á ongan hátt samanberst við ráfiskabýtið.

– Eg taki ikki undir við eini skipan sum ráfiskabýtið var, tí tað er ikki til bata fyri nakra framleiðslu, ella prís. Tá er tað øðrvísi at leggja fiskiloyvini út á økini, tí tað ávirkar ikki kappingina um fiskin á landi, tí hvør sum helst kann keypa fiskin, sigur Bogi Mortensen.

# Ikki kollveltandi broytingar

**Í dag verður aðalorðaskifti á tingi um fiskivinnupolitikkin í Føroyum í framtíðini. Fiskivinnuráðið heldur ikki, at vit kunnu bænta kollveltandi broytingarnar**

AÐALORÐASKIFTIÐ
*Áki Bertholdsen*

Á tingfundi í dag fer Løgtingið at hava aðalorðaskiftið um frágreiðingina, sum Jørgen Niclasen herfyri legði fram um framtíðar fiskivinnupolitikkin.

Jørgen Niclasen sigur, at endamálið við frágreiðingini er at birta upp undir eitt fiskivinnupolitiskt orðaskifti.

– Frágreiðingin er ætlað, sum ein stevnuskrá fyri framtíðina, ið saman við niðurstøðunum frá orðaskiftinum í Løgtinginum, verður grundarlagið undir at seta fiskivinnupolitisku kósina framyvir, sigur Jørgen Niclasen

### Ikki kollveltandi broytingar

Fiskivinnuráðið hevur havt frágreiðingina til viðgerðar og tað heldur ikki, at lagt verður ikki upp til kollveltandi broytingar í fiskivinnupolitikkinum.

– Hetta er ein frágreiðing, sum “signaliserar stabilitet”, heldur Ráðið.

Fiskivinnuráðið metir, at tilfarið er eitt gott yvirlit yvir, hvørjar reglur og viðurskifti annars eru galdandi í fiskivinnuni. Í onkrum broti kann tó vera eitt sindur trupult at finna greiðu á, hvat ið er galdandi reglur, og hvat er stevnumið.

Á hesum fundinum í Fiskivinnuráðnum vóru Maria F. Róin, sum er formaður, Marita Rasmussen, sum umboðar Ráfiskakeyparafelagið, Óli Jacobsen fyri Fiskimannafelagið), Auðunn Konradsson fyri Meginfelag Útróðrarmanna, Gunnbjørn Joensen, sum umboðar Reiðararfelagið og Osmund Justinussen, ið eisini umboðar Reiðararfelagið, umframt Eyðfinn Finnsson, sum er skrivari hjá ráðnum.

### Ikki semja

Fiskivinnráðið sigur, at í ráðnum var serligur áhugi fyri tí, sum stendur um rættindini at keypa og selja fiskirættindi.

– Semja er ikki í ráðnum um umsetiligheit, onkrir limir vilja hava størri umsetiligheit, aðrir ikki, onkur limur tekur undir við uppskotinum um, at markið fyri umsetiligheit millum bólkar verður flutt úr 40 tonsum niður í 15 tons, onkur mælir til, at einki mark skal vera fyri umsetiligheit millum bólkar, meðan umboðið fyri Meginfelag Útróðrarmanna mælir til, at markið verður flutt uppá 110 tons soleiðis, at skott verður millum útróðrarflotan og skipini, sigur Fiskivinnuráðið.

Annars sigur Fiskivinnuráðið, at fiskivinnan á landi tekur fult út undir við at størri dentur verður lagdur á gransking og menning , og at vinnan sær fram til at síggja fiskivinnupolitikkin á hesum øki verða framdan í verki.

Tó vísir ráðið á, at biotøkni, sum helst er eitt vakstrarøki í fiskivinnuni framyvir, ikki er nevnt í frágreiðingini